gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Einki er einasta leið

Fullveldi er ikki ein leið, men eitt mál. Øll kunnu vit vera samd um, at flestu føroyingar halda, at fullveldi er eitt mál uppá sikt, men fleiri eru leiðirnar at røkka hesum máli. Eyðkennini fyri fanatismu eru staðfestingar av absoluttum sannleikum og proklameringar um, at okkurt er einasta leið. Syrgiligt er, um onkur bert sær eina leið, og enn meira syrgiligt er, um hendan leiðin er skeiv ella bland er komið millum mál og miðil.

Í brátt farna ári hava vit sæð eina ikki sørt mannminkandi tilgongd. Føroyska samráðingarútspælið um fullveldi var - sum andstøðan eisini hevði á orði áðrenn samráðingarnar byrjaðu - ósmæðið. Tað, ið onkur pástendur var karaktermorð uppá føroyingar, var meira at meta sum eitt karaktersjálvmorð framt av samgonguni. Vónandi síggja vit ongantíð aftur slíkar undirmineringar av føroyskum sjálvsvirði, sum til dømis at sita í tímavís á einum fundi og royna at fáa donsku stjórnina at viðurkenna, at teimum ikki tørvar at góðkenna eina føroyska loysing. Um vit halda, at teimum ikki tørvar at góðkenna loysingina, hví skulu vit so partú hava teir at viðurkenna tað? Tað skal vera okkara vón fyri tað nýggja árið, at Føroya kosnu menn fara at føra seg fram á ein hátt, ið ger, at føroyingar — eisini útisetar búsitandi í Danmark — kunnu bera høvdið høgt og vera ernir av teimum. Hettar hevur ikki verið støðan í ár, har menn ósmæðið hava kravt evsta vald fyri annans gjald.

Varaløgmaður hevur havt á orði, at eingin hevur sagt ella kann siga, at sáttmálauppskotið hjá landstýrinum ikki hevði verið ein góður karmur um ein felagsskap millum tvær tjóðir. Vit loyva okkum at ivast í hesum pástandi, men skulu, um hann er rættur, hervið vera teir fyrstu til at siga, at uppskotið hevði ikki verið ein góður karmur um ein felagsskap millum tvær tjóðir. Tað hevði givið ein ikki sørt ringan smakk, um vit framdu evsta vald fyri annans gjald. Tað skal vera okkara nýggjársynski, at ósmædnið og kravmentaliteturin verður lagt á hillina í komandi ári soleiðis, at vit venda aftur til at valda so hvørt sum vit gjalda.

Vónandi sleppa vit í tí nýggja árinum frá, at politisk litað brøv vera send til ST undirskrivað av embætisfólki. Føroya landsstýri kann til eina og hvørja tíð fáa upplýsingar frá ST eins og hvør heimsborgari kann tað. Gott hevði verið, um samgongan sjálv fór at avlíva sínar egnu mytur um, at føroysk embætisfólk ikki kunnu fáa upplýsingar úr ST.

Búskaparligi spurningurin, ið veruliga er tað, ið skilir Føroya Landsstýri og donsku stjórnina kemur vónandi í fokus í tí nýggja árinum. Okkum tørvar greiðar linjur, tí í løtuni er tað greitt sum ein fløkjustampur, hvat samgongan ætlar viðvíkjandi tí búskaparliga. Annars vil blaðið ynskja øllum viðskiftafólki sínum og øllum føroyingum eitt gott nýggjár og tøkk fyri tað farna

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Hanus Lassen 60 ár



Skiparin á Smyrli seinastu mongu árini klaksvíkingurin Hanus Lassen fylti seksti herfyri. Hanus Lassen er kendur sum ein drívandi maður og góður sjómaður. Hann hevur ført óteljandi ferðafólk trygt millum oyggjarnar.

Tað var tó slett ikki ætlanin av fyrstan tíð, at Hanus bara skuldi sigla innanoyggja og so okkurt hissini skeið í millumlandasigling. Hann tók siglingstíð og varð skúlaður umborð á Sjúrðaberg hjá Kjølbro fyrst í seksti árunum og har stóð toskur ovast á listanum. Og allar best var um tað fleyt yvir í báður borðum á einum tjokkfullum dekki onkunstaðni í Barentshavinum, á Halanum ella á teim nú toskatómu bankunum í Vesturgrønlandi. Miðskeiðis í sekstiárunum tók hann skipsførarauprógv á Sjómansskúlanum í Havn.

Í 1973 fekk Hanus Lassen starv sum leiðari á Strandferðsluni í Klaksvík. Tó lívið á landi við fast undir fótum leiddi hann og so var hann aftur at síggja umborð á strandfaraskipum um Leivvíksfjørð. Pendulfarturin millum Klaksvík og Leirvík varð avloystur av Smyrli og har hevur hann verið síðan.

Hanus býr og er giftur í Klaksvík. Tá hann hevur frí, heldur hann nógv til í Mikladali, har hann eigur hús og jørð. Vinir siga um hann, at hann er ein rættuligur heimamaður, tá hann er heima.

### Pauli Larsen 60 ár

Skipari og stýrimaðurin á Smyrli, porkeringurin Pauli Larsen hevur eisini rundað tey seksti nú við árslok. Pauli býr á Tvøroyri. Hann er einkjumaður. Pauli Larsen byrjaði sína karrieru sum DFDS maður og sigldi úti í fleiri ár. Síðan kom hann heim aftur og fór at sigla við skipaum hjá Skipafelagnum. Seinastu mongu árini hevur hann verið við Smyrli har hann hevur verið stýrimaður og eisini skipari.

Menn siga um hann, at hann er ein framúr sjómaður, róligur og álítandi

# Sosialurin setir enn eitt met

Í hálvan annan tíma í gjár setti Sosialurin enn eitt met, sum tað føroyska blaðið, ið er komið oftast út í einum ári. Frá tí løtu í gjár, tá fyrstu Sosialarnir lógu í leysasølunum og til Dimma hálvan annan tíma seinni kom í blaðbúðirnar, var blað nummar 251 hjá Sosialinum metblað í Føroyum. Ongantíð fyrr er eitt blað komið við so nógvum útgávum.

Sosialurin var eisini undangongublaðið, tá farið var undir fimmdaga útgávu í september 1990. Í 1991 vóru met dagligur kostur hjá Sosialinum. Fyrr var blaðið bert komið út tríggjar ferðir um vikuna og fyrstu mongu mánaðarnar var blaðið einsamalt við fimmdaga útgávuni. Útgáva tríggjar ferðir um vikuna gav góð 150 bløð árliga, nú eru vit upp á 251. Hetta verður neyvan broytt aftur fyrr enn útgávan verður økt við einum blaði um vikuna. Nær ella um tað verður er ein heilt onnur søga.

# Alnót fekk GSM loyvi

**Við loyvinum frá Vinnumálastýrinum at veita GSM tænastur, hevur telefelagið Alnót nú øll sløgini av fjarskiftisloyvum, sum kunnu fáast í Føroyum**

FJARSKIFTISKAPPING
*Rúnar Reistrup*

Mikudagurin í hesi vikuni gjørdist seinasti dagur, har Føroya Tele var einsamalt á marknaðinum fyri sølu av fartelefontænastum. Hósdagin fekk næststørsta telefelagið í landinum, Alnót, nevniliga loyvi frá Vinnumálastýrinum at veita GSM tænastur í Føroyum.

Alnót er higartil einasta telefelagið umframt Føroya Tele, sum hevur fingið hetta loyvi.

Sambært einum tíðindaskrivi, sum Alnót hevur sent út í sambandi við loyvisveitanina, fer felagið í fyrstu atløgu at gera íløgur fyri einar tredivu milliónir krónur. Hendan íløga skal ætlandi gera tað møguligt hjá telefelagnum at veita íbúgvum í Tórshavn, Skálafjørðinum og pørtum av Eysturoynni og Klaksvík fartelefontænastur. Sjálvt væntar felagið, at hetta fer at gerast møguligt longu í summar.

Telefelagið Alnót hevur frammanundan fingið øll tey fjarskiftisloyvir, sum kunnu fáast í Føroyum, og felagið ætlar eisini sær bæði inn á marknaðin fyri telefonsamrøður um fasta telefonnetið, og inn á marknaðin fyri internettænastur.

Á hesum báðum økjum væntar felagið at kunna bjóða seg fram í apríl mánaði komandi.

## Tøkk

Hjartaliga takka okur øllum, sum gleddu okum á silvurbrúdleypsdegnum tann 16.12.00, og gjørdu okum dagin so hugnaligan.

Ein serstøk tøkk fyri gávur, telegramm, uppringingar og til tykkum øll, sum hjálptu til. Eisini takka okur børnum okra fyri stóra hjálp.

Okur ynskja ætt, vinum og kenningum eitt av Harranum signað nýggjár og takka fyri tað brátt farna.

**Sanna Elina og Ólavur Hovsgarð**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




Miss Galaxy, Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen:

# – Eg fari at venja hart til EM og HM

**26 ára Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen úr Havn er Miss Galaxy ár 2000. Hetta varð avgjørt í høllini á Hálsi hóskvøldið. Í komandi ári fær hon møguleika at umboða Føroyar í EM og HM í ávikavist Spania og Kina, og hon fer eisini at venja nógv fram til tær kappingarnar**

MISS GALAXY
*Stefan í Skorini*



*Forðarenningin var sera krevjandi. Her sveiggjar ein av luttakarunum seg í stativi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Vinnarin av Miss Galaxy kappingini, Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen, sigur, at nú má hon av álvara taka annað skinn um bak til altjóða kappingarnar, sum vera næsta ár.

Sóleyð gongur á dansiskúla í Århus, har hon byrjaði í september. Umframt at ganga á dansiskúla venur reguliga aftaná skúlatíð.

– Eg havi vant lítið meira enn vanligt til hesa kappingina, men nú tá eg skal uttanlands, má eg fara at venja nógv meira, sigur Sóleyð.

Hon hevur roynt eina líknandi kapping fyrr, tí í 1997 varð hon kosin Føroya fimasta kvinna. Tá var bara kappast í forðabreytum og slíkum, og ikki í bikini og kjóla. Eingin slík kapping hevur verið síðani.

Í fyrstu viku í juli skal Sóleyð til Spania, har hon skal luttaka í evropeiska meistaraskapinum. Og í september gongur leiðin til Kina at kappast í heimsmeistaraskapinum.

Sóleyð ásannar, at hetta eru stórar avbjóðingar, men hon er glað fyri at hava fingið møguleikan at umboða Føroyar í stórum kappingum.

– Nú eg havi fingið møguleikan at umboða Føroyar, skal eg hava eitt heiðurligt úrslit í EM og HM. Tí ætli eg mær at eta rættan kost og fari eisini at venja meira.

Sóleyð leggur afturat, at hon vónar, at slík kapping verður aftur í næsta ár.

– Tá vóni eg, at fyrireikararnir eisini fara at skipa fyri slíkari kapping fyri menn, sigur Sóleyð.

### Miss Galaxy

Hetta er fyrstu ferð, at skipað verður fyri slíkari Miss Galaxy kapping í Føroyum. Í kappingini ræður tað um hjá kvinnunum bæði at vera vakrar og fimar í forðarenning.

Kappingin var í trimum pørtum. Fyrst skuldu tær vísa seg í kjóla og síðani í bikini. Dómararnir gjørdu sínar metingar um kvinnurnar, men eingin fekk at vita, hvat úrslitið av hesum báðum fyrstu kappingunum var.

Síðani skuldu kvinnurnar vísa síni kynstur í forðarenning. Ein krevjandi breyt varð sett upp í høllini, og tað ráddi um at sleppa skjótast ígjøgnum allar forðingarnar.

Allir tríggir partarnir telja ikki eins nógv, tá teljast skal saman at enda. Tað hevur størst týdning at vinna forðabreytina, tí hon telur 50%. Kappingin í bikini telur 40%, meðan kjólin bara telur 10%.

Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen úr Havn var skjótast á forðabreytini. Hanna Dalsgarð av Argjum var beint í hølunum á henni, meðan Junie Hansen úr Havn var á triðja plássi.

Tað vísti seg, at endaliga úrslitið var tað sama sum í forðarenningini.

Sóleyð og Hanna høvdu góðar tíðir, og vóru eitt fitt petti frammanfyri hinar kvinnurnar.

– Eg visti ikki, hvussu tað fór at ganga í kjóla og bikini, men eg hevði sett mær fyri at vinna forðabreytina, tí har eri eg sterkast, sigur Miss Galaxy 2000.

– Tað gekk eisini sum eftir ánni. Eg fekk nøkur blá merki á vegnum, men tað hugsar man ikki um fyrr enn aftaná, sigur Sóleyð.

# Regin og Sámal bastu heimsins sterkastu

**Regin Vágadal og Sámal Jóhannes Hansen megnaðu at basa finska parinum, sum fyrr hevur vunnið heimsmeistaraheitið, í styrkikapping í ítróttarhøllini á Hálsi hóskvøldið. Teir høvdu viljan at vinna og góvu eisini alt, teir áttu**

STYRKIKAPPING
*Stefan í Skorini*

Samstundis sum kvinnurnar kappaðust um at gerast Miss Galaxy, kempaðu aðrar kempur ein annan dyst á pallinum.

Tað hevði eydnast fyrireikarunum at fáa heimsins sterkasta par til Føroyar at kappast ímóti tveimum av Føroya sterkastu monnum.

Finnarnir Janne Virtanen og Janni Polonen vóru mótstøðumenn hjá teimum.

Kappast var í fimm ymiskum kappingum, og Regin og Sámal vunnu 3-2 samanlagt.

### Spennandi kapping

Tað var greitt frá byrjan av, at føroyska parið vildi vísa sínum heimaáskoðarunum, at teir veruliga vildu vinna.

Fyrsta kappingin var at lyfta 30 sekkir, sum vigaðu 40 kilo, uppá ein kassa. Regin og Sámal skiftust um at lyfta.

Hetta var ein sera spennandi og tøtt kapping. Føroyska parið var bara nøkur fá sekund fyrr at fáa seinasta sekkin beindan burtur og vann sostatt fyrstu kappingina.

Næsta kappingina var at halda einum sjónvarpi á 50 kilo uppi so leingi sum gjørligt. Hesa kappingina vunnu finnarnir sannførandi, tá føroyingarnir góvust nakað skjótt.

Tvær tær næstu kappingarnar vunnu føroyingarnir. Tað var at koppa dekk og at lyfta 90 kilo uppum høvd. So var kappingin avgjørd.

### Ovurfegnir

Tað var ein sera fegin Sámal Jóhannes Hansen, sum Sosialurin fekk fatur á eftir kappingina. Sum heild vóru teir báðir føroyingarnir meira enn væl nøgdir við endaliga úrslitið.

– Hetta hevði eg als ikki væntað. Tá ein hevur í huga, at hetta er millum heimsins sterkastu menn, so er hetta eitt gott avrik frá okkum, sigur Sámal Jóhannes Hansen.

– Fyrst luttók eg bara fyri at gera mítt besta, og eg hevði verið nøgdur, um vit bara vunnu eina kapping. Vit sóu so, at vit høvdu ein møguleika eftir fyrstu kappingina, og eg eri ógvuliga bilsin av at vinna. Eg eri bara himmalskt glaður, sigur Sámal.

Sámal hevur vant nakað meira til hesa kappingina, og serliga vandi hann konditión. Av hesum misti hann tíggju kilo og fór aftur frá 128 til 118 kilo. Tá er vandi fyri, at hetta ávirkar styrkina, men tað bilaði ikki, greiðir Sámal frá.

– Vit góvu alt, og tað gav úrslit, sigur Sámal Jóhannes Hansen at enda.



*Sámal Jóhannes Hansen koppar dekki. – Eg eri ovurfegin um sigurin, sigur Sámal*
*Mynd: Jens Kr. Vang*